LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 19. august 2016
J.Nr.: LUM-79- 16/00083-1
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Kunning**

**um hoyring av børnum og ungum**

Tann 1. oktober 2014 fekk Løgtingsins umboðsmaður uppgávuna at hava eitt serligt eftirlit við børnum og ungum m.a. at halda eyga við, at ST-Barnarættindasáttmálin verður fylgdur í Føroyum. Í málum, sum eru komin inn til umboðsmannin, hevur verið ein ábending um vantandi hoyring av børnum. Umboðsmaðurin fer tí at minna á rættindini hjá børnum og ungum at verða hoyrd.

Í grein 12 í Barnarættindasáttmálanum er ásett:

> "Stk. 1. Luttakaralondini skulu tryggja einum barni, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, rættin til frítt at greiða frá hesum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið; dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum og hvussu búgvið tað er.
>
> Stk. 2. Við atliti at hesum skal barnið serliga fáa høvi til at koma til orðanna í einari og hvørjari viðgerð av málum við dóms- ella fyrisitingarmyndugleika, sum viðvíkja barninum, annaðhvørt beinleiðis ella gjøgnum eitt umboð ella ein hóskandi stovn, og skal tað gerast í samsvari við mannagongdir, sum eru ásettar í tjóðarrætti."

Eitt barn, sum er ført fyri at orða sína egnu meining, hevur rætt til frítt at greiða frá sínari hugsan í øllum viðurskiftum, sum hava eina ella aðra ávirkan á barnið. Hetta er galdandi bæði í málum, sum barnið sjálvt hevur tikið stig til og í málum, sum onnur hava tikið stig til. Sum dømir kunnu nevnast mál, tá foreldrini verða sundurlisin, ættleiðing og fráboðan til barnavernd. Tað er ikki neyðugt, at barnið hevur eina meining um sjálvan spurningin, sum avgerð skal takast um. Tað er nóg mikið, at barnið er ført fyri at meina okkurt av týdningi í sambandi við spurningin.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

**Aldursmark**
Sambært Barnarættindasáttmálanum er einki aldursmark fyri, nær eitt barn hevur rætt til at siga sína hugsan. Myndugleikarnir skulu meta um førleikan hjá barninum at gera sær síni egnu meiningar. Teir skulu í útgangsstøðinum hugsa, at barnið er ført fyri hesum. Tað er ikki neyðugt, at barnið dugir at orða sína meining týðiliga. Eisini samskifti uttan orð, so sum spæl, yvirbrá, kropsburður og tekningar hjá barninum, skal viðurkennast og virðast. Tó má barnið hava vit, vilja og kenslur og duga at samskifta í ein slíkan mun, at tað er møguligt hjá teimum vaksnu at tulka, hvat barnið sigur, og hvat annars kemur til sjóndar hjá barninum.

**Búnaskapur**
Tá metast skal um, í hvønn mun barnsins meining og ynskir skulu ávirka avgerðina, skal dentur ikki bara leggjast á aldurin á barninum, men eisini á, hvussu búgvið barnið er. Hvussu stórur dentur skal leggjast á meiningina og ynskini hjá barninum er eisini treytað av, hvat málið snýr seg um, og hvussu sterk, áhaldandi, veruleikakend, umhugsað og væl grundað meiningin hjá barninum er. Tað er týdningarmikið, at myndugleikarnir grundgeva, hvussu spurningurin um búnaskap hjá barninum verður mettur.

**Hoyringin**
Barnið skal kunna greiða frá sínari hugsan uttan at verða trýst ella manipulerað til tað. Barnið skal upplýsast um, at tað ikki hevur skyldu til at greiða frá sínari hugsan. Um barnið ikki ynskir at siga nakað, eiga myndugleikarnir á annan hátt at royna at finna útav, hvørja áskoðan barnið hevur, t.d. við at tosa við persónar, sum barnið er væl við ella við at hyggja at upplýsingum, sum liggja í málinum frammanundan.

Barnið skal kunnast um málið og málsviðgerðina, soleiðis at barnið skilur málið, hvørjar avgerðir kunnu verða tiknar og hvørjar avleiðingar tær kunnu fáa. Hoyringin skal vera í einum barnavinarligum umhvørvi av fólki, sum hevur útbúgving til tess, soleiðis at barnið kennir seg virt og trygt. Hoyringin av barninum skal vera á einum máli, sum barnið bæði skilur og dugir at tosa til fulnar. Barnið skal ikki hoyrast oftari enn neyðugt.

**Umboðan**
Barnið eigur, so vítt gjørligt, sjálvt at siga sína meining, tí meiningin kann skiljast annarleiðis, tá onnur bera hana fram. Barnið kann eisini velja at lata eitt umboð ella ein hóskandi stovn framføra meiningina fyri seg. Umboðið kann t.d. vera eitt foreldur, ein advokatur ella annar persónur, t.d. ein sosialráðgevi, sum barnið hevur álit á. Tað mest sjálvsagda umboðið fyri barnið er foreldrini, men her má havast í huga, at í nógvum málum er vandi fyri áhugamálsstríði millum barn og foreldur.

Umboðið skal bera meiningina og ynskini hjá barninum víðari ærliga og reiðiliga og má ikki ávirka barnið við sínum egnu meiningum. Umboðið skal vera tilvitað um, at viðkomandi bara

umboðar meiningina hjá barninum og ikki eisini meiningina hjá øðrum, t.d. foreldrum, stovnum og myndugleikum.

Um barnið úttalar seg gjøgnum ein hóskandi stovn, má hesin vera óheftur av pørtunum. T.d. kann ein málsviðgeri í kommunalu barnaverndarumsitingini ikki metast at vera hóskandi stovnur at umboða barnið í Høvuðsbarnaverndarnevndini í einum barnaverndarmáli. Harafturímóti kann ein barnaserkønur, sum kannar málið, vera hóskandi stovnur at umboða barnið í Høvuðsbarnaverndarnevndini, um viðkomandi ber hugsanina hjá barninum týðiliga fram og ikki blandar sína egnu hugsan um barnsins besta uppí.

Umboðsmaðurin heitir við hesum á myndugleikar og onnur, sum hava ábyrgd av børnum og ungum, um at hava omanfyristandandi í huga í sambandi við mál, sum snúgva seg um viðurskifti, sum hava við børn og ung at gera.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður